## FSF flytir dystir

Fótbóltssambandið hevur flutt eitt umfar í Formuladeildini og 1. deild orsaka av landsdystinum ímóti Póllandi tann 14. mai. Umfarið í Formuladeildini, sum skuldi spælast hendan dagin, er flutt til mikudagin 10. mai. Harafturat boðar FSF frá, at 1. deild menn spælir sítt 8. umfar sunnudagn 14. mai, men landsliðsúttøka kann hava við sær, at onkur dystur verður fluttur – her verður serliga hugsa um dystin hjá TB, har Óli Johannesen spælir við.



## FSF-skipanin komin

Fótbóltssambandið hevur nú givið kappingarskipanina fyri 2006 út. Í skipanini eru yvirlit yvir allar kappingarnar hjá FSF – frá teimum vaksnu til tey yngstu – og harafturat eru viðkomandi upplýsingar um feløgini, FSF, kappingarreglur og mangt annað. Skipanin er eitt hent amboð hjá teimum, sum á onkran hátt varða av fótbólti ella fylgja við í onkrum av kappingunum.

# LÍF og AB eru nú tey fremstu



*Hjá TB hilnaðist væl á páskum. Leygardagin vunnu teir næsta dystin upp í slag. Hesa ferð móti HB*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Í báðum toppuppgerðunum var tað ógvuliga tætt, og í báðum førunum varð sigursmálið skorað fram móti dystarenda**

1. DEILD 4. UMFAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tvær toppuppgerðir vóru á skránni, og í báðum førum var tað ógvuliga tætt. B71, LÍF, FSV04 og AB stríðast um tey bæði fremstu plássini. Í løtuni eru LÍF og AB oddalið, men tað er ógvuliga tætt.

B71 hevði leikliga yvirvág fyrstu løtuna, og síðani var tað heilt javnt. Men tað vóru gestirnir av Argjum, sum fóru við øllum. Allan Mørkøre gjørdist einsamallur og sveik ikki. Tá var 2. hálvleikur meiri enn 47 minuttir gamal!

Í Leirvík var tað ein innskiftur klaksvíkingur, sum stutt undan leikloki skoraði einasta málið fyri heimaliðið. Marius Nystrøm Hansen setti krúllin undir bóltin og so var 1-0 til LÍF. Í Leirvík er áhugin fyri liðnum, sum ikki hevur roynt seg í fremstu deildini í treittan ár, rættuliga stórur.

FSV04 misti í 2. hálvleiki tríggjar spælarar, sum sóu reytt!

Hjá TB hilnaðist páskafótbólturin stak væl. Eftir 3-2 móti KÍ á heimavølli Skírisdag vunnu teir 4-1 á HB á heimavølli. Uni Arge minkaði um munin við brotssparki til 3-1. Olivur Abrahamsen, sum var skaddur í fyrstu umførunum, og Kaj Roest skoraðu tvær ferðir í part fyri TB.

SÍ vann í Vági, men tað leyp einki av. Tríggjar minuttir undan leikloki skoraði Bogi Selfoss sigursmálið, eftir at John Poulsen eitt korter undan leikloki hevði javnað. VB/Sumba gjørdi sjálvmál í 1. hálvleiki, og teir eru framvegis stigaleysir.

KÍ og Royn høvdu undan 2. páskadegi ikki fingið stig. Royn hevur framvegis einki stig fingið. Tað hevur KÍ, sum vann 5-0 og harvið hevur tikið fyrsta stigið móti málinum, sum er at varðveita plássið í deildini.

# B71 og FSV høvdu fult

**AB og LÍF mistu fyrstu stigini, tá ið innanhýsis uppgerðin teirra millum á Argjum endaði við javnleiki**

1.DEILD 3. UMFAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

B71 og FSV04 høvdu fulla úrtøku eftir trý tey fyrstu umførini, tá farið varð um skírisdag. B71 var frammanfyri 2-0 og 4-2 í Gundadali móti HB, og teir vunnu 4-3. Men tað var um reppið, at teir mistu á stokkinum, tí HB misnýtti fyri opnum máli í yvirtíðini.

FSV04 vann 7-0 á Valloyrini móti Sumba/VB, sum sjáldan var í nánd av brotsteiginum hjá heimaliðnum. Birgir Joensen skoraði fýra ferðir.

AB og LÍF mistu fyrstu stigini, tá ið innanhýsis uppgerðin teirra millum á Argjum endaði 1-1. Spælandi LÍF venjarin, Hans Fróði Hansen legði gestirnar framum eftir deyðbólt, og ein onnur gomul landsliðskempa, Allan Mørkøre, javnaði eitt korter undan leikloki.

Eftir fyrsta korterið tóktist TB skula vinna stórsigur móti KÍ, men tað gjørdist kortini meiri spennandi enn so. Tvær ferðir var TB frammanfyri við tveimum málum, og tvær ferðir svaraði KÍ aftur. 3-2 Heimasigurin vóru fyrstu TB stigini í hesum kappingarárinum.

Sørvingar vóru fullkomuliga oman á móti Royn, sum einki hevði at bjóða uppá. Fýra av SÍ málunum vóru brasilsk. Marcello skoraði tríggjar ferðir og tykist rættuliga at vera í støtinum.